Stutt og greitt um Føroyar

Føroya Landsstýrið hevur givið út árbók fyri Føroyar. Hagstova Føroya hevur lagt arbeiðið til rættis.

Í formælinum sigur Atli Dam, løgmaður, at árbókin miðjar ímóti at geva eina rúma lýsing í orðum og tølum av føroyskum samfelagsviðurskiftum, serstakliga av tí seinasta árinum, men eisini vísandi aftureftir til undarfarin ár.

Áður góvu landstsýrið og ríkisumboðið í felag út sonevndu ársfrágreiðingina, men fyri tveimum árum síðani varð avgjørt, at geva út hvør sína bók. Hetta er onnur útgávan av nýggju árbókini fyri Føroyar.

Um árbókina sigur Hagstovan millum annað, at so hvørt sum føroyingar sjálvir hava tikið yvir á alt fleiri økjum, er parturin av fyrisitingini, sum ríkið stendur fyri, minkaður. Tað var tí náttúrligt hjá landsstýriunum at fara undir at geva út sína egnu árbók. Ríkisumboðið vildi samstundis skerja sína útgávu til eina ársfrágreiðing, ið meira miðaði móti danskari lesifjøld.

Í mun til gomlu ársfrágreiðingina er føroyska árbókin nógv økt við nógvum nýggjum talvum og upplýsingum.

Árbókin fyri Føroyar fæst í bókabúðunum fyri 125 krónur. Í bókini eru 430 blaðsíður og 350 talvur. Prentað hevur Einars Prent.

tór.-

Vatnveiting ovast á skránni



Á teirri íløguætlan Klaksvíkar Býráð hevur sett sær sum mál stendur vatnveitingin ovast á skránni. Síðani Helnabrekka, Bakkavegur og síðst Undir Klakki.

Fíggjarætlanin sjálv kemur eisini til viðgerðar á býráðsfundinum í Klaksvík í kvøld.

Meiriliutin í býráðnum mælir til, at skattaprosentið verður sett til 18, sum er tað sama sum í ár, og barnafrádráttin til 2500 krónur. Meirilutin mælir eisini til, at kirkjuskattaprosentið verður 0,25%.

Ein minnilutin, Jákup Mikkelsen mælir til at lækka skattaprosentið niður í 16,5 og at barnafrádrátturin verður 2500 krónur.

Skemman kemur fyri aftur

Á býráðsfundinum í kvøld kemur eisini málið um umsóknina um byggiloyvi til Skemmuna. Ein meiriluti í Klaksvíkar Býráð sýttu Skemmuni byggiloyvi, men Skemman kærdi avgerðina til landsstýrið. Nú hevur landstsýrið givið býráðnum boð um at taka málið upp til nýggja viðgerð.

tór.-

Drúgvur orðadystur um laks

Tingmenn gjørdust ikki sørt harðmæltir undir orðaskiftinum um laksaavtaluni við íslendingar. Niels P. Danielsen vildi vera við, at landsstýrið hevði noytt Felagið Laksaskip at gera avtaluna. Hesum avvísti landsstýrismaðurin





Niels Pauli Danielsen helt fyri, at John Petersen, landsstýrismaður hevði noytt Felagið Laksaskip at gera avtaluna við íslendingar, men hesum avsannaði landsstýrismaðurin

Tingið samtykti at taka undir við teirri avtalu um laksaveiðu, sum gjørd er millum Ísland og Føroyar.

Men óátalað skuldi hendan avtala ikki fara aftur við borðinum, hava tingmenn hildið, og orðaskiftið í tinginum hendan dagin var bæði drúgvt og til tíðir hart.

Ásbjørn Joensen helt fyri, at hetta var ein søguligur sáttmáli. At eitt fólk, sum ikki eigur breyð í munnin, skal lata alla laksakvotuna frá sær, helt hann vera márghættligt. Hann spurdi hvør fekk peningaligan vinning úr avtaluni.

Niels Pauli Danielsen fanst eisini harðliga at avtaluni. Hann vildi vera við, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevði noytt felagið Laksaskip at gera avtalu við íslendingar, og Jógvan I. Olsen ivaðist ikki í, at landsstýrið hevði handlað í heimildarloysi.

John Petersen, landsstýrismaður avvísti, at hann á nakran hátt hevði noytt Felagið Laksaskip til nakað sum helst. Hann segði, at hetta var skilagóð avtala sum eisini loysti seg fyri okkara viðkomandi upp á allar mátar.

Landsstýrismaðurin segði, at virðið á avtaluni skuldi setast upp ímóti tí møguligu laksaveiðuni, sum hann helt vera sera ivasama.

Seytjan tingmenn atkvøddu fyri avtaluni, sum nú er endaliga avgreidd úr tinginum.

tór.-

Færøernes Kommando og Vaktartænastan

Samskipaða leiðslu innan sjómarkið

–Hvussu leingi landstýrið ætlar, at bjargingartænasta á Føroyskum sjóøki skal halda fram á hendan hátt, vita vit ikki, men til hendan samskipaða leiðslan kann avloysast av eini betri, stendur hon við, siga ovastarnir á báðum bjargingartænastunum

Ovastarnir á Færoernes Kommando og Vaktar og Bjargingartænastuni, kommandør C. Høgh og Jákup Ziskason halda, at fólk eru ikki greið yvir hvussu tær báðar bjargingartænasturnar virka og tí hava teir hildið tað verið neyðugt at koma við eini frágreiðing í einum tíðindaskrivi til fjølmiðlarnar.


Fyrst verður víst á, at bjargingartænastan í føroyskum sjóøki er føroyskt sermál. Tá vaktar og Bjargingartænastan var stovnað í 1978 varð lógarfest, at stovnurin skuldi fyrisita føroyska partin av bjargingartænastuni. Eftir hetta var tað heilt náttúrligt at V&B og Færøernes Kommando samskipaðu leiðsluna, tá talan var um bjargingartiltøk í føroyskum sjóøki.. Hetta samarbeiði hevur staðið roynd í fleiri væleydnaðum bjargingartiltøkum.

Bjargingarmiðstøð

Tá eitt hvørt hendur á føroyskum sjóøki, sum kann seta mannalív í vága fer Bjargingarmiðstøðin í Tórshavn til verka.

Bjargingarstøðin er altjóða kend undir navninum MRCC Tórshavn. Tá støðin er virkin, so eru tað leiðarin fyri Vaktar og Bjargingartænastuni og Flotaradio Tórshavn til í sama húsi, og hetta hevur fyrimunir viðvíkjandi skjótari avgreiðslu og samskifti.

Í tí løtu, vakthavandi á Færøernes Kommando fær fráboðan um eina støðu, ið er ella kann bliva ein neyðstøða á sjónum, ovastin fyri Færøernes Kommando ella varamenn teirra, sum leiða tiltakið.



Tekningin vísir hvussu Bjargingarmiðstøðin Tórshavn virkar

Kommando

Orsøkin til at MRCC Tórshavn, sum stendur fyri Maritime Rescue Coordination Center heldur til í hølunum hjá Færøernes Kommando er, at her er vakt alt samdøgri. Eisini heldur verður MRCC Tórshavn sett í gongd. Allar neyðugar fráboðanir og umbønir um hjálp verða sendar út og leiðslan tilkallað. Frá MRCC hølunum verða so øll tiltøkini samnskipaði. Tiltøkini kunnu umfata fleiri mynduleikar, felog og eindir. Eisini uttanlanda.

jústinus